


***Nr. 3*** ***31. januar 2021*** ***81. árg.***

# Hygg upp á ein nýggjan máta

*„Ja, eg leit fast á at fáa Harrans náði at sjá í lívsins landi.“*
*Sálm. 27,13.*

Tá ið tú byrjar at hyggja at tingunum frá Guds sjónarhorni, so broytir tað tínar kenslur. Tað einasta, sum heldur tínum gomlu neiligu kenslum í gongd, eru tínir tankar.

Í gomlu King James umseting stendur: „Tí sum hann hugsar í sál síni, so er hann.“ Orðt. 23,7 V.D. Tá ið tú fert undir at hugsa teir røttu tankarnar, byrjar lív títt eisini at ganga rætta vegin. Men minst til, at tú bleivst ikki neiligur eftir einum degi, og at tú helst ikki verður jaligur eftir einum degi. So, hvussu byrjar tú?

**1)** Tú skalt taka „eina og hvørja dygd“ (Fil. 4,8) og seta hana í staðin fyri neiligar hugsanir. Tú skalt fara við neiligum tonkum sum við flugum – kveistra teir burtur. Hetta eydnast tær við venjing og áhaldni. Hetta er eitt val, tú gert!

**2)** Áðrenn tú stígur inn í framtíðina, minn teg so í huganum á Guds trúfesti í fortíðini. Shakespeare segði: „Lat hvørki dag ella nátt fara framvið í vanhalgan, men minst altíð til, hvat ið Harrin hevur gjørt.“ Dávid segði: „Eg leit fast á at fáa Harrans náði at sjá í lívsins landi. Eftir Harranum bíða! Hav gott troyst, tak mót í hjarta og Harranum bíða!“ Sálm. 27,13–14.

Vit hava ikki fleiri trupulleikar enn onnur fólk, vit hugsa bara meir um teir. Um tú skalt uppliva eina kenslu, skal hon fyrst skapast í tonkunum, áðrenn tú kanst „framleiða“ hana. Hetta er kollveltandi, hetta er lívsumbroytandi kunning – og hon vil broyta lív títt, um tú gert eftir henni!

*Effie Campbell* umsetti.

# „Ei skalt tú ræðast sótt. (pest)“

Maria Monsen (1878–1962), norskur trúboðari í Kina, greiðir soleiðis frá:

Tað var á teimum døgum, tá ið „spanskasjúkan“ herjaði alla verðina (1918–1920). Samstundis sum „spanska“ fór at gera um seg hjá okkum í Kina, komu tíðindi úr Noregi, hvussu hon gjørdi um seg har.

Tá kom eg at hugsa um hetta: Tað tykist eingin munur at vera á Guds fólki og teimum vantrúgvandi. Einaferð í tíðini var munur á Ísrael og egyptum. Men nú er eingin munur. Er tað rætt ella skeivt? Eg visti ikki og bað Gud geva mær ljós yvir henda spurning.

So kom pestin til okkara bý, og fólk doyðu sum flugur. Grannarnir stóðu í portrinum á kvøldi og vórðu jarðaðir morgunin eftir.

Tá kom eitt bræv úr Noregi. Tað hevði tikið 2½ mánað at náa fram. Niðast stóð skrivað: „Gud hevur á ein serstakan hátt mint meg á hesa ferð at senda tær Sálm 91,5–8: „Ei skalt tú ræðast ræðslur á nátt, ella ørv, ið flýgur á degi, ei sótt (pest), ið seg sníkir í myrkri, ella sjúku, ið herjar um middagsleitið. Um so túsund falla tær við lið, og tíggju ferðir túsund við høgru hond tína, teg tað tó einki skal saka, hans trúfesti vernd er og verja.“

Hetta gamla orðið bleiv nýtt fyri mær. Og í versi 8 kom svarið upp á mín stóra spurning: „Bert við tínum eygum skalt tú tað síggja, revsing teirra gudleysu fært tú at skoða.“ Hetta var sostatt upprunaliga ætlan Guds. – Av Guds náði krøkti trúgvin seg upp í lyftið.

Júst tá høvdu vit uml. 80 evangelistar og bíbliukvinnur á støðini til eitt skeið. Nógv teirra komu langvegis frá. Um nú fleiri fóru at doyggja, so fór tað at kosta ómetaliga nógv at fáa líkini aftur til heimstaðin. Bønir vórðu uppsendar, og Gud svaraði bønunum. Eingin doyði á trúboðarastøðini. Summi krøktu seg við trúnni í Sálm 91,5–8 og gjørdust ikki sjúk. Mong fingu sóttina, og nú vóru nógv sjúk at røkta. Eg hevði støðugt ein fígginda í hølunum á mær, sum áhaldandi júkaði: „Um tú vilt sleppa undan sjúkuni, mást tú halda teg langt burturi frá øllum sjúklingunum.“ Tíbetur var tað púra ógjørligt hjá mær.

Ein dagin beint eftir middag fór at renna úr eygunum. Ein hørð, miskunnarleys og treisk rødd segði: „Nú hevur tú sjúkuna – hetta er eitt av eyðkennunum.“ Bíblian lá opin framman fyri mær. Við fingrinum á lyftinum tók eg uppaftur: „Eg havi ikki hesa sjúkuna – her stendur, at um túsund falla mær við lið, so skal hon ikki raka meg. Eg mótmæli í Jesu navni móti at hava hesa sjúku. Jesus sjálvur er Orðið.“ So linkaðu álopini eina løtu, fyri síðani at herja á uppaftur ógvisligari. Men eg segði sum fyrr. Tá ið eg fór til songar, hevði eg sigur í mínum anda.

Eftir middag dagin eftir fór at dryppa úr nøsini, og hin miskunnarleysa ágangandi røddin var í stundini har: „Nú hevur tú fingið hana, tú veitst, at hetta er eitt av eyðkennunum.“ Eg kendi á mær, at um eg tók ímóti eyðkennunum, fekk eg eisini sjúkuna. Eg gjørdi sum dagin fyri. Álopini vardu allan seinnapartin. Eg mótmælti móti teimum og fór til songar við sigri í andanum eisini tað kvøldið.

Dagin eftir var tað hálsurin. So vóru álopini aftur har: „Tey siga øll, at tey fáa ilt í hálsin, nú hevur tú fingið sjúkuna.“ Eg fór aftur at endurtaka lyftið. Men henda dagin ætlaði satan ikki at gevast. So var songartíð, men uttan at hava sigur í andanum tordi eg ikki at leggja meg. Klokkan var 11, og álopini hildu á. Hálvan tíma seinni treiv eg, tá ið stríðið var harðast, eftir einum tjúkkum pappíri – hetta var leiðsla Guds, tað skilti eg seinni – og skrivaði lyftið á tað við stórum bókstøvum. Eg helt tað framman fyri mær og las tað aftur og aftur. Tá ið klokkan sló 12, varnaðist eg, at satan hevði smoygt sær út. Full av friði og gleði fór eg til songar, og eg fekk ikki spanskusjúkuna.

Fleiri av teimum sjúku nemingunum fingu trúgv at verða grøddir – mitt í svárastu sjúkuni. Tað vóru ikki fá, sum upplivdu, at tá ið vit eftir teirra umbøn løgdu hendurnar á tey og bóðu fyri teimum, so fóru tey beinanvegin at sveitta, so tað rann av teimum, og fepurin var alt fyri eitt farin. Eg haldi næstan, tað vóru uml. 15, sum upplivdu at verða grødd sama dag. Harvið fingu vit eitt heilt annað huglag inni á sjúkrastovunum. Har hoyrdust takkar- og lovsongur. Eftir hetta varð biðið fyri øðrum sjúkum, sum gjørdust frísk, uttan at eg tá var uppií.

*Effie Campbell* umsetti.

# Smith Wiggelsworth greiðir frá

„Eg minnist einaferð, at eg fór út úr einum jarnbreytarvogni at vaska mær um hendurnar. Eg var júst tá inni í einum tíðarskeiði, sum eg hevði sett av til bøn, og Harrin hevði fylt meg við yvirflóð av kærleika sínum. Eg var á veg til eina ráðstevnu í Írlandi, og eg kundi ikki koma hagar nóg skjótt. Tá ið eg kom inn aftur í vognin, var Andi Harrans so máttmikil yvir mær, at eg haldi, at andlit mítt skein.

Í klivanum sótu eisini tveir prestar, og tá ið eg kom inn, rópti annar: „Tú sannførir meg um synd!“ Áðrenn tríggir minuttir vóru farnir, róptu øll í klivanum um frelsu. Tílíkt er hent mær mangar ferðir. Hetta er tann tænastan í Heilaga Andanum, sum Paulus talar um í 2. Korintbræv kapittul 3. Her skrivar hann um, at vit skulu vera bæði bræv hansara og spegilsmynd hansara. Henda Andans fylling ger lív títt so munadygt, at enntá fólk í handlinum royna at sleppa sær burtur frá nærveru tíni, tí tey gerast sannførd um synd.“

Henda frásøgnin vísir okkum teir ómetaligu møguleikarnar í einum lívi, sum hevur litið seg upp í Harrans hendur. Syrgiligt, at summi velja at síggja lívið við einum so stuttum sjónarringi sum teir dagarnar, okkum eru tilmáldir her í tíðini. Ævinleikin er Guds mál við okkum, og honum leingjast vit eftir.

„Í dag er óreinska sum ein byrging, sum tippir fyri Guds flóðaldu,“ skrivar Michael L. Brown. „Har byrgingin verður brotin, fer ein himmalsk vatnflóð at koma.“

*Effie Campbell* umsetti.

---

## Heimsins týdningarmesta bók!

Tað virðismiklasta, tú kanst geva einum menniskja, er Biblian! Guds orð er dýrabart. Tað finst einki, sum kann metast við virði á einari Bibliu, tí tað er einasta bókin, sum gevur fólki lykilin til, hvussu tey kunnu verða frelst og fáa ævigt lív.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 31. jan. | Tekstur: | Luk. 2,41-52 | bíbliuorð: | Matt. 2,49b |
| 7. febr. | Tekstur: | Mark. 2,1-12 | bíbliuorð: | Matt. 25,40b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




***Nr. 4 14. februar 2021 81. árg.***

# Guds breyð gevur heiminum lív

Jesus segði við teir: „Eg eri lívsins breyð. Tann, sum kemur til mín, skal ikki hungra, og tann, sum á meg trýr, skal aldri tysta.“ Jóh. 6,35. Í tí natúrliga er breyð ein týdningarmikil partur av kostinum og føðslugrundarlagið hjá okkum menniskjum. Vit eta tað dagliga. Tí biðja vit í Faðirvár: Gev okkum í dag okkara dagliga breyð. Breyðið styrkir hjartað og er av stórum týdningi í kostinum. Tá ið Jesus sigur: „Eg eri lívsins breyð,“ skilja vit, hvønn týdning breyðið hevur, og at tað gevur okkum lív. Tí sigur Jesus í Matt. 4,4: „Skrivað stendur: Menniskjan livir ikki av breyði eina, men av hvørjum orði, ið gongur úr av Guds munni.“

Tá skilja vit, at Jesus er Guds orð, og at Jesus er hitt livandi breyðið, og líka sum vit eta breyð dagliga, tørvar okkum Guds orð dagliga. Tí tá fáa vit styrki, vegleiðing, rættleiðing, ugga og alt, sum okkum er tørvur á. Hetta er tað, sum ger allan munin á veikum og sterkum kristnum, nevniliga dagligt breyð, sum er, at vit dagliga taka til okkum av Guds orði. Tað ger okkum sterk. Um vit ikki dagliga lesa í Guds orði, gerast vit veik og hjálparleys kristin, sum bara virka út frá kenslum og umstøðum, og vit falla fyri hvørjari freisting.

Sálmur 102,5 sigur tað so gott: „Mítt hjarta er sviðið sum grasið og følnað, tí eg mist havi hugin at eta mítt breyð.“ Soleiðis er tað við einum og hvørjum hjarta, sum ikki hevur fylt seg við Guds orði. Einki lív er har. Har er einki at byggja á í trongdar- og krepputíðum. Grundarlagið fyri at trúgva er ikki til staðar í einum slíkum hjarta, tí tað hevur ikki tikið til sín av trúarinnar orði.

Tá ið vit hava „etið“ Harrans orð, er hjartað fult av Guds orði, so at vit kunnu proklamera og tala Guds lyfti yvir okkum sjálv, okkara familju, okkara bý ella bygd og okkara land. Av tí at vit siga tað hart, hendir tað. Tí í orðsins DNA liggja kraft og lív. Hví? Tí Gud vakir yvir orði sínum, so tað ikki vendir tómt aftur, men útinnir tað, sum tað verður sent til (Jes. 55,11). Harrin arbeiddi við og staðfesti orðið við teimum teknunum, sum við fylgdu (Mark. 16,20). So tá ið vit virka og tala Guds orð, vil hann staðfesta tað. Hví? Tí „dýrt hevur Tú gjørt orð Títt, meir enn alt navn Títt“ (Sálm. 138,2).

*Effie Campbell* umsetti.

# Ert tú meira enn eitt dýr?

Enski natúrsøgufrøðingurin, Charles Darwin, gav í 1859 út eina kollveltandi bók í lívfrøði *„Om Arternes Oprindelse“*.

Umframt at kunna greiða frá, hvussu jarðarinnar øgrynni av lívi er kyknað upp, segði Darwin, at menniskjan er bara eitt dýr sum øll onnur dýr.

Henda læran hevur spreitt seg sum ein pest og fyllir børn okkara við lygn frá fyrsta degi í skúlunum.

Guds orð sigur nakað heilt annað. Tú ert einki dýr, og tú ert ikki ættaður frá apum ella amøbum. Tú ert skaptur í Guds mynd – og tú ert dýrabarur. Les skapanarfrásøgnina og gev tær far um, hvussu Gud skapti alt annað, sum kom undan menniskjanum. Til dømis 1. Mós. 1,24: „Og Gud segði: „Jørðin ali fram livandi skepnur, hvørja eftir sínum kyni, fenað, skriðkykt og villdjór, hvørt eftir sínum kyni!“ Og tað var so!“

Gud talaði – og um tað vóru blómur, fuglar, fiskar ella onnur dýr, so vóru tey brádliga har.

Byrjanin hjá menniskjanum var púra øðrvísi. Gud segði: „Latið okkum gera menniskju í bílæti okkara, til at vera okkum lík!“ (1. Mós. 1,26 V.D.) Og víðari: „Gud Harrin myndaði menniskjað úr moldini í jørðini og blásti lívsanda í nøs hansara, so at menniskjað varð livandi sál.“ (1. Mós. 2,7 V.D.)

„Tú hevur nýru míni gjørt, hevur meg vovið í móðurlívi! Eg tær lovi, tí á undurfullan hátt eg varð skaptur.“ (Sálm. 139,13–14).

Guð talaði fyri at fáa skapanarverkið at stíga fram. Men Hann vav og vevur menniskju í móðurlívi. At veva er okkurt

ógvuliga persónligt. Og tað vovna menniskjað hevur Guds lívsanda í sær.

1. Jóh. 5,10 er eitt álvarsligt orð til teirra, sum ikki trúgva Gudi. Har stendur: „Tann, sum ikki trýr Gudi, hevur gjørt hann til lygnara."

Men Gud er Sannleikin, sum er, at tú ert ikki eitt dýr. Tú ert skaptur í Guds mynd. Tú ert vovin í móðurlívi! Tú ert undurfullur! So undurfullur, at Jesus doyði tína vegna, so tú kanst liva – enntá við Jesu uppreisnarlívi í tær. Trúgv ikki læruni hjá Darwini. Hon er villleiðing, fals og lygn. Róm. 1,22 sigur: „Teir reypa av at vera vísir, men eru fávitskutir!"

Lat Guds Orð altíð vera ljósið á gøtu tíni- eisini tá ið tað ræður um skapanina.

*Effie Campbell* umsetti.

# Man kona gloyma bróstabarn sítt?

Tað er Gud, sum spyr henda spurning í Jes. 49,15 einaferð, tá ið Ísrael var í einari ringari støðu, eini støðu, vit øll kunnu koma í, og sum kann vera gróðrarbotnur fyri myrkum tonkum: „Harrin hevur svikið meg, Harrin hevur gloymt meg!" (vers 14 V.D.)

Tá ið vit eru væl fyri og hava undanvind og góðan byr, fáa slíkir tankar ikki fótafesti í okkum. Men tá ið vit eru illa fyri og hava mótvind og kanska hava snávað, tá kunnu hesi orð sum eitt skýggj sveipa seg um okkum: „Harrin hevur svikið meg, Harrin hevur gloymt meg!"

Guds svar til Ísrael, Jerusalem og tað jødiska fólkið tá – og í dag – og til eitt og hvørt lítið Guds barn í dag – sum fær líknandi tankar í framtíðini, er … „Man kona gloyma bróstabarn sítt, ein móðir tað barn, sum hon bar undir hjarta? Hesar mega gloyma, men eg gloymi ikki teg!"

Og Harrin heldur fram í versi 16 og 17: „Sí, í mína hond havi eg rist teg, borgargarðar tínir eru mær altíð fyri eyga. Skjótt koma synir tínir aftur, men teir, sum brutu teg niður og løgdu teg í oyði, fara frá tær." Hetta profetaorðið fekk Ísrael fyri 2.800 árum síðani gjøgnum Jesaja. Teir niðurbrotnu múrarnir eru bygdir uppaftur.

Ísraels børn, jødarnir, eru komnir heim. Tær tjóðirnar, sum síðani 1948 hava viljað lagt Ísrael í oyði, hava stríðst til fánýtis.

Men sum mong av Guds profetaorðum so er hetta eisini dupult. Tí hetta fatar eisini um teg, sum trýrt á Frelsaran Jesus, sum kom frá jødunum.

**Onnur kunnu gloyma teg, sigur Harrin – men…**

* Eg gloymi ikki teg!
* Navn títt er skrivað við einum nagla í hond mína!
* Eg endurreisi tínar niðurbrotnu múrar!
* Eg savni saman børn tíni – slekt tína!
* Oyðarin má fara sín veg!
* Tí tú ert mín – og eg eri tín!
* Lít ikki á kenslur tínar, men á orð mítt!
* Eg leiði teg allan vegin heim!
* Smíl – tí eg smíli til tín!

Lat ikki kenslurnar lumpa teg – men lít á Sannleikan, sum er: „Eg gloymi ei teg!" sigur Harrin. Tá ið Gud kann endurreisa sundursorlaðu múrarnar hjá eini tjóð – so kann hann eisini gera tað í tínum og mínum lívi – í okkara slekt.

*Effie Campbell* umsetti.

# Sterkasta vernd – Jesu blóð

Ein evangelistur í Indonesia sigur soleiðis: „Eitt kvøldið var eg á veg heim av einum møti. Eg gekk gjøgnum ein skóg. Tá sá eg nakað, sum eg helt vera ein træstokk. Men tá ið eg kom nærri, reistist ein stór slanga, og hon var til reiðar at leypa á meg. Tá rópti eg hart: „Jesu blóð!" Og slangan hvarv.

*e.c.* ums.

---

Tað kemur eitt ættarlið, sum ikki skal doyggja, men sum verður rykt burtur, tá ið Jesus kemur í skýggjunum.

*e.c.* ums.

---

**SUNNUDAGSSKÚLIN**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 14. febr. | Tekstur: Matt. 4,1-11 | bíbliuorð: Matt. 4,10b |
| 21. febr. | Tekstur: 1 Mós. 30,22-24; 37,1-28 | bíbliuorð: Róm. 2,11 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74